# Nærmynd av Niger

**Studentahjálparfelagsskapurin Operatión Dagsverk fer hetta skúlaárið at stuðla afrikanska landinum Niger. Í hesum sambandi vóru umboð fyri høvuðsskrivstovuni hjá felagsskapinum í Niger í juli mánaði, har tey í tvær vikur hava vitjað landið í samband við nýggju OD-kampagnuna**

**OPERATIÓN DAGSVERK**
*Annika Hedegaard Isfeldt*



Hetta er annar partur úr ferðafrágreiðingini



**23. juli**
Í dag var fyrsti dagur í Kaima – ein dagur við stórum upplivingum.

Vit eru býtt upp í tríggjar bólkar, sum í eina viku skulu vitja hvør sína bygd fyri at gera okkum eitt inntrykk av gerandisdegnum og mentanini her. Í okkara bygd, Kaima, búgva fólkasløgini hausa og fulani síðu um síðu og hetta hevur mangan elvt til trupulleikar.

Undir eini samrøðu við læraranum í bygdini, kom sonurin hjá fulanileiðaranum ein túr framvið og bjóðaði okkum til navnaseremoni. Tá ið vit komu til fulanibygdina, vóru øll sera gestablíð og glað um, at vit vóru komin. Unga vakra mamman bjóðaði okkum inn í smáttu sína fyri at síggja nýføddu, lítlu, rukkutu gentuna. Hóast unga aldurin, hevði mamman longu trý smá børn at taka sær av.

Fólkavøksturin í Niger er tann størsti í heiminum (3,3% um árið) og kvinnurnar fáa her í miðal 9-12 børn. Tað er lívsneyðugt at eiga nógv børn herniðri, so man altíð hevur onkran at hjálpa sær í tí dagliga arbeiðinum og kanska eisini tekur sær av einum, tá ið man verður gamal. Tá ið vit vóru komin fram til smáttuna, fóru allir menninir saman yvir til nakrar hyttur, har sjálv navnaseremoniin var. Kvinnum er ikki loyvt at vera við til hetta, so vit vóru tí eftir hjá ungu mammuni og bíðaðu spent eftir at hoyra hvat navn, imamurin hevði valt til ta lítlu gentuna.

Tá ið vit søgdu ungu mammuni farvæl fyri at fara heim til døgurða, segði tulkur okkara, sum hevði verið við til navnaseremoniina, henni navnið hjá lítlu gentuni. Hon flenti hart – hetta var nokk ikki júst navnið, hon hevði viljað givið dóttur sína.

Í einum landi, har tað nærum ongantíð regnar, steðgar alt upp, tá ið regnið so endiliga kemur. Hetta sóu vit, tá ið vit seinni um kvøldið komu aftur fyri at luttaka í navnaveitsluna. Nógvir gestir vóru longu farnir til hús og fólkini í lítlu bygdini sótu nú saman og taldu gávurnar upp. Sjálvi høvdu vit tikið sápu við fyri 3000 CFA (30 kr.) sum gávu til mammuna. Eg hevði havt eitt ynski um, at vit skuldu keypa teimum okkurt meira enn hetta, men ein innføddur hevði greitt okkum frá, at sápa fyri 30 kr var ein fín gáva. Tá ið vit góvu gávuna, mátti eg eisini ásanna, at hann nokk hevði havt rætt - øll jublaðu so nógv, at vit næstan vórðu illa við av hesum. ”Evropa bjargar heiminum, Evropa bjargar okkum øllum” róptu tey aftur og aftur – og so byrjaði ballið aftur fyri at vísa stóra taksemi teirra. Sjálvandi skuldu vit gentur vera við til at læra nigerskan dans og royna allar prýðislutir teirra. Tey vóru so ivrig, at vit næstan ikki mundu sloppið avstað aftur.

**24. juli**
Klokkan var ikki meira enn farin av fimm í morgun, tá ið Jon, sum er journalistpraktikantur hjá Care, vakti meg. Hóast vit seinastu dagarnar eru vaknaði rættiliga tíðliga av nógvu morgunljóðunum, men hetta var so fyrsti dagur, vit vórðu noydd til at fara eins tíðliga upp og niger'arir, tí vit skuldu út til Kaima fyri við okkara egnu eygum at síggja, hvussu ein morgun sær út har.

Tá ið vit komu út til bygdina var klokkan farin av seks og ferð var longu á øllum í bygdini – einki eitur at sova leingi her; man fer upp, tá ið sólin kemur upp og man leggur seg, tá ið sólin fer niður. Tey hava einki elektrisitet og sovitíðin fylgir døgnrytmuni hjá sólini. Sum tann kvinnuforkemparin eg nú einaferð eri, tók eg mær stundir til at hava nakrar morgunsamrøður við kvinnur í fleiri aldrum um serstøku viðurskifti teirra. Í Niger vita allar kvinnur, at pláss teirra er í heiminum og arbeiði teirra er at passa og verja familjuna. – Eg hevði verið eydnuríkasta kvinnan í heiminum, um eg orkaði at taka mær av manni og børnum mínum, men soleiðis er veruleikin her tíverri ikki. Eg noyðist at arbeiða hart allan dagin og havi ongantíð frí – uttan tá ið eg sovi. Arbeiði er fyri meg bert ein náttúrligur partur av lívinum.

Eftirmiddagin brúktu vit aftur saman við læraranum í skúlanum. Hesa ferð hevði hann tikið nakrar næmingar við, sum vit sluppu at práta við um skúlagongdina og teirri dreymar um framtíðina. Tað er áhugavert at síggja, hvussu øðrvísi skúlabørnini eru í mun til hini børnini í bygdunum, sum ikki sleppa at ganga í skúla. Munurin á teimum skúlaðu og teimum óskúlaðu børnunum er m.a., at tey fyrstnevndu eru meira skikkilig, duga franskt og har afturat hava tey eisini lært um heilsu og etikk. – Eg vil vera lærari, segði ein 11-ára gamli drongur. – Eg vil brúka mína vitan og

## FAKTA

Á stórfundinum í desember í fjør avgjørdu føroyskir og danskir OD-bólkar í felag við atkvøðugreiðslu, at ODhjálpin í ár skal fara til afrikanska landið Niger, ið er fjóðra fátækasta land heimsins.

Í 2003 fór yvirskotið av søluni frá Børnenes Julekalender í Danmark til at byggja skúlar til børn í Niger, sum OD fara at arbeiða víðari við við m.a. at halda hesar við líka og gera teir størri. Tað eru hesir skúlar, hjálparfelagsskapurin vitjaði í juli mánaða.

Saman við hjálparfelagsskapinum Care, sum í mong ár hevur verið við til at menna Niger, fer OD at byggja 19 nýggjar flokksstovur til børn í Maradi-umráðnum.

